# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Móttøka í nýggju brandstøðini

Fríggjadagin var almenn móttøka í samband við at nýggja brandstøðin í Vestmanna varð tikin í nýslu.

Nógv fólk vóru komin saman í Miðalsbrekku, har støðin er bygd. Eisini komu fólk frá øðrum sløkkiliðum í landinum.

Nýggja støðin er tilsamans 338 fermetrar stór. Kommunan hevur raðfest sløkkilið frammaliga, og støðin er sera væl fyri við útgerð sum t.d. bjargingarbáti og pumpum, umfram aðrari bjargingarútgerð.

Sløkkiliðið í Vestmanna røkir eisini grannabygdina Válin og samstarvar við sløkkilið í øðrum bygdum. 17 mans eru knýttir at sløkkiliðnum.





*Brandmeistaraprát, f.v.: Finn Hansen, brandmeistari í Klaksvík, Sunleiv Højgaard, Brandmeistari í skálafjarðar sløkkilið, og Petur Seloy, fyrrverandi brandmeistari í Tórshavnar kommunu, og Fríðálvur Bláhamar brandmeistari í Vestmanna*

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Katrina Solborg Hansen**, ættað úr Árnafirði, búsitandi í Funningi andaðist á Vesturskin á Toftum Hvítusunnudag, 83 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Funnings kirkju mikudagin kl. 14.

**Hans Thomsen, Sumba**, fer til gravar úr Sumbiar kirkju mikudagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Hans, kunnu lata Missiónshúsinum í Sumba eina gávu. Konta í peningastovnunum.

Leygardagin 10. mai andaðist í heiminum **Jens Eli Lauritsen, í Sørvági**, 33 ára gamal.

**Súsanna Mortina Brattaberg, Vági**, vanliga nevnd Tina, andaðist í heiminum á Krossjørð leygardagin 10. mai, 58 ára gomul.

## Kjakfundur um trúgv og vísund

Hóskvøldið 15. mai 2008 kl. 20 skipar samkoman Lívdin í Hoyvík fyri kjakfundi um trúgv og vísund í hølunum hjá Lívdini á Brekku 3 í Hoyvík.

Evnið á kjakfundinum verður "Trúgv og vísund – avbjóðingar og møguleikar" við undirheitinum: Hvussu kunnu vit liva okkara trúgv í modernaða samfelagnum á ein skynsaman hátt?

Tað vera teir báðir Dánjal Jákup Jacobsen, Ph.D. í gagnnýttari støddfrøi, og Poul F. Guttesen, Ph.D. í gudfrøði og bíbilskari gransking, sum fara at hava hvør sína framløgu um vísindaliga ástøði, ið teir arbeiða á, og hvussu hetta ávirkar trúgv teirra.

Aftaná verður høvi at seta spurningar til Dánjal Jákup og Poul, og møguleiki verður hjá áhoyrarunum at taka lut í kjakinum.



Fundurin er tann næsti í eini røð. Tann fyrri var hóskvøldið 21. februar 2008, har evnið var trúgv og politikkur.

Kjakfundurin verður í hølunum hjá Lívdini á Brekku 3. Í bygninginum aftan fyri MBM-bygningin í Hoyvík.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Herbjørn Simonsen**
av Sandi

andaðist og varð jarðaður.
Ein hjartans tøkk til tykkum, sum vóru um hann og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað – eingin nevndur og eingin gloymdur.
Hjartaliga takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Frelsunarherin.

*Heilsan*
**Lorraine**
**Andy og Mortan v. fam.**

## Bilvask á Super Dekk

Leygardagin 10. mai vaskaði ein 8. flokkur í Argja skúla bilar á Super Dekk við Hoyvíksvegin í Havn til frama fyri eina ferð til London hjá flokkinum.

Bikvaskið byrjar kl. 10 um morgunin, og vaskað varð so leingi bilar komu. Undirtøkan var sera góð, og nógv nýttu høvið at fáa bilin vaskaðan til hvítusunnu.

Samstundis sum bilvaskið fór fram, bjóðaði First Stop ókeypis kanning av dekkum.



*Foreldrini hjálptu eisini til. Hjørdis Í Liða leggur Heðini Mortensen, borgmeistara, lag á*

**Dagurin**
**15. mai. Halvarðsøka,** fyrr í tíðini eisini rópt halvarðsmessa. Verður hildin til minnis um Hallvarð, systkinabarn Ólavs hin heilaga. Navnið er norrønt og merkir hella og verja.